# Sørvingar fingu dygga mótstøðu

**Føroyameistararnir úr SÍ fingu nógv harðari mótstøðu, enn teir sjálvir allarhelst høvdu væntað, tá ið ÍF vitjaði í Sørvági**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Spenningurin er langt síðani farin úr kappingini hjá monnum í flogbólti, tí sørvingar hava verið fullkomiliga einaráðandi í ár, og teir hava ikki tapt ein dyst síðani í oktobur mánað í fjør.

## Neyðugt við javnbrótara

Sunnudagin vóru tað so fuglfirðingar, ið vitjaðu føroyameistararnar í Sørvági, og tað er ikki ov nógv sagt, at SÍ var um reppið at fáa sína fyrsta ósigur í nærum eitt hálvt ár.

Tað gekk annars sum væntað hjá sørvingum, sum vunnu fyrsta settið 25-18. Men síðani fóru teir úr ÍF av álvara at bíta frá sær, og teir vunnu næsta settið 25-22, og tað var rættuliga trygt, hóast tølini ikki vísa hetta.

Triðja settið gjørdist eitt tað mest spennandi. Liðini fylgdust allan vegin, men tá ið avtornaði vóru tað gestirnir úr Fuglafirði, ið vóru omaná og vunnu settið 26-24.

Nú var setningurin greiður hjá føroyameistarunum. Skuldi sigursrøðin hjá teimum halda fram, so var neyðugt hjá teimum at vinna næsta settið, og síðani at vinna javnbrótaran. Og hetta var júst tað, sum sørvingar gjørdu. Teir vunnu fjórða settið í stórum stíli 25-12, og tí var farið til javnbrótaran.

Javnbrótarin gjørdist eisini rættuliga spennandi, men tað eydnaðist tó SÍ at halda fram á sigurskós, tí teir vunnu 15-12, og harvið vunnu teir dystin 3-2. Uttan iva var mótstøðan frá ÍF harðari, enn sørvingarnir høvdu væntað, og tað man verða lítið at ivast í, at teir í Fuglafirði irða seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at steðga sigursrøðini hjá føroyameistarunum, nú teir vóru so nær við.

## Mjølnir heldur fast í silvurinum

Ein annar dystur var í meistaradeildini hjá monnum um vikuskiftið. Dysturin var í Klaksvík millum Mjølnir og Fram. Mjølnir liggur í løtuni til at vinna silvurið, men Fleyr er beint í hølunum á teimum, og tí var neyðugt hjá klaksvíkingum at basa Fram, um teir ætla sær at halda fast í silvurinum.

Mjølnir gjørdi eisini sína skyldu og vann dystin 3-1. Teir vunnu tey bæði fyrstu settini rættuliga greitt, ávíkavist 25-9 og 25-17, men í triðja settinum kom Fram fyri seg og vann 25-21. Fjórða settið var eisini rættuliga spennandi, men tað var Mjølnir, ið hevði munin, og klaksvíkingarnir vunnu settið 25-21, og harvið tryggjaðu teir sigurin í dystinum.

**Mjølnir-Fram 3-1 (25-9, 25-17, 21-25, 25-21)**
SÍ-ÍF 3-2 (25-18, 22-25, 24-26, 25-12, 15-12)

# Mjølnir og TB

**Oddaliðini í meistaradeildini hjá kvinnum, Mjølnir og TB liggja jøvn í stigum, eftir at TB um vikuskiftið vann trupla útidystin á Giljanesi móti Drátti**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Tað er ikki langt síðani, at vit her í blaðnum høvdu hug til at nevna Dráttur sum ein møguligan FM-vinnara í meistaradeildini hjá kvinnum, men vágaliðið hevur snávað í tveimum teimum seinastu týðandi dystunum, og tí noyðast tær at taka til takkar við bronsuni.

## Oddaliðini halda tørn

Leygardagin var dystur á Giljanesi millum júst Drátt og annað av oddaliðunum, TB. Vikuskifti frammanundan hevði Dráttur tapt greitt fyri hinum oddaliðnum Mjølnir á heimavølli, og harvið mistu tær í veruleikanum møguleikan fyri at gerast meistarar. Um hetta hevur havt sína sálarligu ávirkan á avrikið hjá Drátti, skal verða ósagt, men tað er ein sannroynd, at í dystinum móti TB leygardagin fekk Dráttur ongantíð av álvara sítt spæl at koyra, hóast munurin á liðunum báðum ikki var serliga stórur.

TB vann dystin 3-0, men settmunurin var ikki so stórur. Fyrsta settið vann útiliðið 25-23, síðani var munurin eitt sindur størri, tá ið TB vann næsta settið 25-20, áðrenn triðja og seinasta settið endaði við einum teprum 25-23 til gestirnir av Tvøroyri.

Við ósigrinum misti Dráttur sambandið til oddaliðini, og tá ið eitt stórt glopp er niður til liðið, sum liggur beint undir Drátti á stigatalvuni, ÍF, so noyðast tær í Drátti at taka til takkar við bronsuni í ár.

Hinvegin heldur TB við sigrinum á Drátti tørn í kappingini við Mjølnir í oddinum. Mjølnir hevði um vikuskiftið vitjan av KÍF, og oddaliðið vann dystin greitt 3-0. Settúrslitini vóru 25-18, 25-23 og 25-19.

Hóast Mjølnir og TB liggja ájavnt í stigum, so má Mjølnir metast at hava nógv tey bestu kortini á hondini, tí liðið hevur væl betur settmun, og harumframt hava tær bert tveir heimadystir eftir, og báðir eru teir móti liðum úr niðaru hálvu á stigatalvuni. Ein dystur var eisini leiktur í Sørvági, og hann var millum SÍ og ÍF. Her var ÍF betra liðið, og tær vunnu dystin 3-1. Botnliðið SÍ royndi annars at bíta frá sær, men mótstøðan var ov sterk. Settúrslitini vóru 21-25, 21-25, 25-21 og 18-25.

**Mjølnir-KÍF 3-0 (25-18, 25-23, 25-19)**
Dráttur-TB 0-3 (23-25, 20-25, 23-25)
SÍ-ÍF 1-3 (21-25, 21-25, 25-21, 18-25)

## Landsliðsvenjing um vikuskiftið

Komandi vikuskifti verður føroyska svimjilandsliðið savnað til venjingar í Klaksvík.

Ikki færri enn 16 svimjarar hava fingið boð um at møta til venjingina, og teir eru: Natalia Reinhardt og Kristian Olsen úr Ægir, Elspa Mørkøre, Karina Petersen, Jákup Øssursson Mohr, Pauli Øssursson Mohr og Kári J. á Høvdanum úr FS, Eyðbjørg Petersen úr Skeggjum, Per S. Hansen og Beinir E. Danielsen úr Flot, Lisbeth L. Joensen, Annika Jacobsen og Bogi Jørgensen úr HS, Jutta Thomsen, Sára Ejdesgaard, Sheila Millum Garðarnar, Anna K. Eysturberg, Malan Bærentsen og Maria Vang úr Tvøroyra Svimjifelag.